## Sjónleikur um samfelag

Ein samkyntur ungur maður í lítla býnum Laramie, Wyoming, USA, verður so illa bukaður, at hann doyr av løstunum. Hendingin fær ikki einans lagnutungar avleiðingar fyri Matthew Shepard og ungu dreingirna, ið framdu illgerðina. Hvør einasti íbúgvi í Laramie kemur í eina tvístøðu, har ikki slepst undan einari uppgerð við egið virðisgrundarlag - við sannleika, sjálvsuppfatan, trúgv og spurningin um fólkaræði. Hetta snýr nýggji leikurin hjá Leikhús Skift seg um. Ein lítlan bý har ein rá og brutal hatursbrotsgerð er framd.Leikstjórin, Solveig Weinkouff, og pallsniðgevi er Filippa Berglund.



## Samstarva um Svalbard

Í mong ár hava norðmenn og russar kjakast um, hvørt tað er rætt at loyva oljuleiting við Svalbard, nú ísurin minkar, ella um økið skal fáa frið. Nú hevur guvernørurin í Murmansk, Jurij Jevdokimov, skotið upp, at norðemnn og russar skulu skipa eitt búskaparøki á Svalbard, soleiðis at londini skulu samstarva um møguligar oljuleitingar í økinum. Umframt oljusamstarv mælir guvernørurin til samstarv innan ferðavinnu, umhvørvi og og fiskivinnu.

# Sunnast í Føroyum vaksa stór súrepli

**Í vakstrarhúsinum hjá Grethu Lassen í Vági standa súreplatrø, ið bera góð og stór súrepli**



*Gretha og Pauli Lassen í Vági hava vakstrarhús og har standa eini 3 súreplatrø. Gretha hevur júst tikið súrepli og fleiri teirra vóru sera stór. Hálvt pund og 230 og 330 gramm*

Mynd: D. Olsen

**SÚREPLI**
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Gretha og Pauli Lassen í Vági hava vakstrarhús og har standa eini 3 súreplatrø. Tey eru av bæði donskum og norskum slag, men felags er, at tey bera bæði góð og sera stór súrepli.

Gretha hevur júst tikið súrepli og fleiri teirra vóru sera stór. Hálvt pund og 230 og 330 gramm. Hetta má sigast at vera stór súrepli, og so enntá í Føroyum

Gretha hevur longu kókað eini 10 pund av súreplum og eisini givið burturav. Men nú stendur hon aftur við fullum fati av stórum súreplum.

Í vakstrarhúsinum vaksa eisini aðrar fruktir, so sum jarðber og perur.

## Angela málningaframsýning í Føroyahúsinum




*Angela Petersen hevur málningaframsýning í Føroyahúsinum*

*Mynd: esj*

**Sunnudagin var fernisering í Føroyahúsinum í samband við at Angela Petersen letur upp málningaframsýning**

Angela sigur, at hon byrjaði at mála sum 13 ára gomul, mest tí at hon er uppvaksin í heimi, har mamman altíð sat og málaði. Fyrsti málningur, ið hon málaði, var við á framsýning hjá mammuni, Arngerð Joensen, og málningurin bleiv seldur til Sandoyar.

Síðani hevurAngela verið við á framsýningum, tó altíð saman við øðrum, og hetta er sostatt fyrsta stakframsýning hennara.

- Ofta máli eg, tá tað er okkurt, ið kann vera ringt hjá mær at tosa um, ella tá eg síggi okkurt, eg havi hug til at greiða frá á mín hátt, sigur Angela.

- Sýningin eitur „EG", tí at tað eri eg sum eksperimenteri við litum og myndevnum. Royni meg sjálva, og tað er sera spennandi, hóast myndirnar ikki altíð verða heilt sum eg vil hava tær, og eg kann blíva við at mála umaftur og umaftur. Tað fantastiskt at sita í einari aðrari verð og bara mála tað, ið ein kennir, ella at royna at lýsa eina støðu. Av tí at eg máli tað, eg havi hug til, er sýningin sera litrík og sera fjølbroytt, sigur Angela.

Deodato Siquir Trio, ið m.a. spælir afrikanskan tónleik, spældi, tá ferniseringin var í Føroyahúsinum sunnudagin.

# Fyrsta venjing verið í Hovstunnlinum

**Týskvøldið klokkan 17 stongdi nýggi Hovstunnilin og hann var stongdur til á leið klokkan 19.. Orsøkin var stór venjing**

**VENJING**
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



*Mynd: D. Olsen)*

Stór venjing var í Hovstunnlinum týskvøldið. Venjingarætlanin bjóðaði stórar avbjóðingar til løgreglu, læknar, sjúkra- og sløkkilið og bjargingarfeløg í Suðuroynni. Trupulleikin var, at ikki færri enn tvey ymisk ferðsluohapp vóru hend. Nakað inni syðru megin hevði ein bilur rent á ein lut á vegnum og ein bilur hevði síðani rent í afturpartin á hesum bilinum. Fólk sótu føst í bilinum.

Við norðara tunnilsmunnan var eisini eitt óhapp. Roykurin frá fyrra óhappinum órógvaði við norðara munnan og her var eisini ógjørligt at koma inn, so sjúkrabilar og onnur, ið komu av Tvøroyri, máttu tí eftir gomlu leiðini um Hovsegg í heldur vánaliga veðrinum, og inn syðru megin.

Eftir venjingina var tíðindafundur, ið var partur av venjingini. Síðani eftirmettu partarnir, og mongu eygleiðararnir venjingina, ið sum heild varð mett at ganga væl.